## Væl av svartkjafti

Seinastu dagarnar hava tey føroysku skipini fingið væl av svartkjafti sunnan fyri Føroyar og suður ímóti markinum. Carlton kom á Fuglafjørð í gjárkvøldið og hevur í dag landað umleið 1.500 tons til Havsbrún. Jupier skuldi byrja at landa um middagsleitið. Teir hava umleið 2.000 tons. Christian í Grótinum hevði boðað frá landing. Teir hava eisini umleið 2.000 tons og byrja at landa í Fuglafirði á middegi í morgin.

## Bókakafé

Mikukvøldið 24. januar byrjar tiltakið við Bókakafé á Hafnia Lounge aftur. Tá fara høvundarnir Sólrun Michelsen, Heðin M. Klein og Bárður Persson at lesa úr egnum verkum, og Arnbjørn Dalsgarð frá at greiða frá tíðarritinum Vencil. Kunningarstovan í Havn sigur, at í januar er vanliga tann mánaðurin, tá lítið og einki er á skránni, og tí er tað eitt frálíkt hugskot at hugna sær innandura við góðum bókum. Bókakaféin byrjar kl. 20.

# Missa 60.000 krónur hvørja einastu viku

**Tað hevur stórar, fíggjarligar avleiðingar, at vit ikki fáa arbeiðsfólk. Tað kostar okkum einar 60.000 krónur hvørja einastu viku, sigur virkisleiðarin á Tavuni í Leirvík**

TROT Á ARBEIÐSMEGI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin*

Trotið á arbeiðsfólkið er ein katastrofa fyri føroysku fiskavirkini og sostatt eisini fyri føroyska samfelagið.

Tað hava fleiri keldur í fiskivinnuni staðfest í Sosialinum seinastu tíðina.

Og Kári Jacbsen, virkisleiðari á Tavuni í Leirvík er ikki ósamdur í, at trotið á arbeiðsmegi er øgiliga stórt.

Hann vísir á, at bara á Tavuni mangla 50% av reinskerarunum.

– Vit hava 16 reinskeraraborð. Men í gjár fingu vit bara 8 reinskerarar til arbeiðis.

Men á Tavuni arbeiða tey í tveimum vaktum, so tilsamans mangla tey 16 reinskerarar á virkinum.

Vanliga hava vit einar 8-10 reinskerarar á hvørjari vakt, hóast vit hava pláss fyri 16, so hjá okkum er hetta ein trongur fløskuhálsur í framleiðsluni, sigur hann.

– Vit kundu beinanvegin tikið tilsamans 15-16 reinskerarar til arbeiðis á Tavuni og tryggja teimum arbeiðið í hvussu so er til í mai mánaði, leggur hann afturat.

Tey kundu eisini tryggja teimum tak yvir høvdið hesa tíðina.

Høvdu vit havt nokk av reinskerarum, høvdu vit eisini havt brúk fyri fleiri fólkum aðrastaðni á virkinum, tí tað er hvørt eftir øðrum.

Annars hava vit eina fasta kjarnu av ógvuliga røskum arbeiðsfólki, sum eisini hevur verið ógvuliga trúføst.



*Tað er meiri tómligt á Tavuni í Leirvík. Tað er ikki tí, at tey mangla fisk, men tí at tey mangla fólk at arbeiða fiskin. Høvdu fiskavirkini í Føroyum nóg mikið av fólki, eri eg vísur í, at avreiðingarprísurin fór upp og minni fiskur fór óvirkaður av landinum, sigur Kári Jacobsen, virkisleiðari. Myndina tók Høgni Thomsen*

### Kostar 60.000 um vikuna

Kári Jacobsen sigur, at trotið á arbeiðsmegi hevur bæði álvarsligar fíggjarligar avleiðingar fyri Tavuna og fyri samfelagsbúskapin.

– Høvdu vit nokk av fólkið, høvdu vit kunnað arbeitt eini 30 tons meiri um vikuna, enn vit gera nú.

Tað merkir, at Tavan leysliga mett, hevur ein inntøkumiss upp á 60.000 krónur hvørja einastu viku.

Og tað er eisini eitt slag av pengum hjá einum virki, sum Tavuni.

– Tað einasta, ið forðar okkum í at keypa meiri fisk,er, at vit hava ikki nokk av fólki at arbeiða fiskin, sigur hann.

Tavan er ikki einasta virkið, sum ikki hevur nokk av fólki.

– Eg er vísur í, at høvdu flakavirkini nokk av fólki, so at tey fingu arbeitt tann fiskin, vit vildu, hevði tað eisini ført til, at avreiðingarprísurin hevði hækkað.

– Men sum er, fáa vit ikki keypt tann fiskin, vit vilja og tað førir til, at eftirspurningurin minkar. Tað førir bæði til lægri prís og til at óneyðuga nógvur fiskur fer óvirkaður av landinum.

Spurningurin um at fáa meiri meiri fólk, er fyri ein stóran part ein politiskur arbeiði.

Og virkisleiðarin á Tavuni vónar, at politikarar heldur velja eina loysn, so at tað ber til at fáa fleiri fólk til virkini, heldur enn at góðtaka støðuna, sum hon er nú, við teirri avleiðing, at vit ikki fáa arbeitt tann fisk, vit vilja, at avreiðingarprísirnir lækka og at meiri fiskur fer óvirkaður av landinum

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í innlendismálum, hevur áður sagt við Sosialin, at arbeitt verður fyri at gera smidligari skipanir, so at tað ber til at fáa útlendingar hendavegin at arbeiða. Hann hevur boðað frá, at ein loysn skuldi fyriligið í vár.

Høvdu vit fingið eina smidliga skipan, so at tað ber til at fáa útlendingar til Føroya, hevði tað ikki tikið ein mánað, so vóru flakavirkini fullmannað –uttan at vit høvdu tikið arbeiðið frá einum tí einasta føroyingi.

Men tað er kortini eitt, sum undrar virkisleiðaran á Tavuni.

– Tað er rættiliga nógv arbeiði á einum virki, sum Tavuni. Vit arbeiða í tveimum vaktum. Um veturin arbeiða vit í 16 tímar um samdøgurið og um summarið arbeiða vit 20 tímar. Sostatt er nokk av arbeiði og tey, sum vilja, kunnu fáa nógva yvirtíð og sostatt eisini rættiliga góða løn.

– Men kortini velja ungar gentur heldur at arbeiða í handlum og kioskum, har tær mangan ikki eru skipaðar í fakfelag og sostatt heldur ongi rættindi hava. Samstundis er lønin mangan lítil og ongin, eins og tær eisini mugu tola at arbeiða um vikuskiftini, tá ið øll onnur hava frí.

Kári Jacobsen heldur, at hetta kann hava samband við, at millum manna er fiskivinnan ofta í ringum orði.

Hann leggur afturat, at á Tavuni hava tey roynt at fáa fleiri fólk umvegis ALS, men tað hevur alt verið til fánýtis.

– Hinvegin hava vit nógvar útlendingar, spyrja um arbeiði, men teir fáa bara ikki arbeiðsog uppihaldsloyvi, hóast vit hava harðliga brúk fyri teimum og hóast vit kenna summar av teimum áður og hava góðar royndir av teimum, sigur Kári Jacobsen.

# Fingu heldur onki burturúr hesuferð

**Sandoyingar mugu enn einaferð staðfesta, at tað nyttar onki at leita eftir arbeiðsfólki í ALS. Tað er ófatiligt, at politiska valdið ikki skundar sær meiri at gera nakað við hendan trupulleikan, sigur Andreas F. Hansen**

TROT Á ARBEIÐSMEGI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Vit fingu heldur onki burturúr hesuferð.

Á Sandoy Seafood hava tey einaferð enn staðfest, at tey fáa ikki nógv burturúr at leita eftir arbeiðsfólki í ALS.

Í farnu viku fekk Sandoy Seafood ein lista við fólki frá ALS og burturúr honum, valdu tey fimm fólk, sum tey mettu, høvdu neyðugan førleika at reinskera.

Talan var um onkrar sandoyingar, onkran úr Havn og onkur aðrastaðni úr Streymoy.

Hesar seinastu mánaðirnar hevur Sandoy Seafood einar tríggjar, fýra ferðir søkt eftir fólki í ALS, men tað hava tey ongantíð fingið nakað burturúr.

So tey høvdu ikki tær stóru vónirnar, nú tey royndu aftur.

Og Andreas F. Hansen, stjóri á Sandoy Seafood, varð ikki tikin á bóli, tí tey fingu heldur onki burturúr hesuferð.

– Tað var heldur ikki væntandi, men so fingu vit staðfest einaferð afturat, at tað verður ikki ígjøgnum ALS, at vit fáa nøktað tørvin á arbeiðsfólki.

– Tað er so stórt trot á arbeiðsfólki á flakavirkjunum kring landið, at støðan má rætt og slætt sigast at vera heilt øgiliga vánalig.

Annars arbeiðis landsstýrið fyri at gera smidliga skipanir, so at tað verður lættari at fáa útlendingar til Føroya at arbeiða.

– Eg haldi at tað er politiskur vilji til at gera nakað við støðuna. So tað mugu vit bara seta okkara álit á, tó at eg haldi, at tað gongur ov seint.

Andreas F. Hansen sigur, at eitt samfelag, sum hevur eitt arbeiðsloysi upp á minni enn 6%, hevur í veruleikanum trot á arbeiðsmegi.

Slík samfelag kunnu ikki hava vøkstur í búskapinum, tí trot er á arbeiðsmegi.

Í Føroyum hava vit eitt arbeiðsloysi upp á 2%. Tað merkir, at í veruleikanum hava vit stórt trot á arbeiðsmegi. Eg ivist onga løtu í, at vit mangla 3-4% av arbeiðsmegini. Sum støðan er nú, er føroyski búskapurin í afturgongd, tí tað er so stórt trot á arbeiðsmegi, at búskapurin kann ikki veksa. Og hetta er ikki bara galdandi fyri fiskivinnuna, men eisini í byggivinnuni og øðrum vinnum við.